


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 09 - 2011

# Jóhanna á Bergi - Síggi stórar møguleikar í oljuvinnuni

Stjórin í Faroe Ship sigur seg hava góðar vónir til eina komandi føroyska oljuvinnu, sum fer at geva arbeiði og inntøkur til samfelagið umframt nýggjar førleikar. Oljan. fo hevur hitt hana á oljumessuni í Aberdeen. Flaggskip til oljuvinnu Sum eitt av flaggskipunum í føroysku flutningsvinnuni var Faroe Ship ein av teimum 12 føroysku luttakarunum á ársins oljumessu í Aberdeen í hesi vikuni. Tað hevur stóran týdning fyri okkum at luttaka á slíkari messu fyri at koma í samband við kundar, og her ikki minst fyritøkur, sum fara at hava eitthvørt tilknýti til leitivirksemi í Føroyum komandi ár, sigur ein avgjørd og bjartskygd Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship. Sjálv er hon von við at vera við á fiskivinnumessum, men hesaferð skuldi tað vera øðrvísi - Tað hevur verið spennandi at vera á messuni í Aberdeen hesar dagarnar. Vit hava havt høvi til at práta við fyritøkur, sum fyrr hava verið veitarar til leitingina við Føroyar og við fólk innan okkara øki, sum vit longu samstarva við í øðrum londum, serstakliga innan flutning og logistikk. -Sær tú flutning í sambandi við leiting og offshorevirksemi sum heild sum ein vaksandi part av tykkara virksemi í framtíðini? Avgjørt. Oljuvinnan er avgjørt ein vinna, sum kundi tilført nakað til føroysku flutningsvinnuna. Við til allar boringar Faroe Ship hevur verið veitari til allar sjey brunnarnar, sum eru boraðir á føroyska landgrunninum hesi seinastu 10 árini, bæði tá talan er um virksemi á landi og á sjónum. Vit hava flutt tilfar millum lond og hava eisini staðið fyri flutninginum av útgerð og tilfari millum útgerðarhavnina í Runavík og boripallarnar. So vit hava havt nógv samband við oljuvinnuna tey árini hon hevur verið í Føroyum. Jóhanna á Bergi leggur stóran dent á tann týdning sum keikanturin hevur havt, nevniliga at tað er eitt krav til útlendsku oljufeløgini og undirveitarar, at øll vøra skal um føroyskan keikant. Hann skapar virksemi innan fyri so nógv ymisk lið í føroyskari vinnu heldur hon. Vit bjóða okkum fram til flutning av góðsi, sum

skal út á boripallarnar. Vit bjóða okkum fram til at vera umboð fyri bæði boripallar og teir supplybátar, sum sigla millum útgerðarhavn og boripall. Haraftrat bjóða vit goymslur og skrivstovuhøli fram til veitarar. Eisini fevna tilboð okkara um at veita skjótar flutningstænastur, um tað er nakað, sum hevur stóran skund. Og haraftrat kunnu vit eisini gera arbeiði á land, sum krevur kranar og líknandi útgerð. Eisini við til 8. brunnin Faroe Ship er partaeigari í Atlantic Supply Base í Runavík og hava tey havt eitt sera gott samstarv gjøgnum árini. Jóhanna á Bergi vónar, at hetta samstarvið kann halda fram, tí í hesum oljuumhvørvinum í oljuhavnini eru nógvar ymsar fyritøkur, ið kunnu veita ymsar tænastur. Faroe Ship ætlar sær tí eisini at vera partur av tí áttandu boringini við Føroyar. -Hvussu kenst tað at vera við til eina slíka oljumessu? Tað er heilt fantastiskt. Nú havi eg arbeitt nógv við fiski og havi verið við á fiskarímessum. Hetta er eitt heilt nýtt øki. Sjálv síggi eg ótrúliga nógvar møguleikar og avbjóðingar innan oljuvinnuna, eitt øki, sum nógvir føroyingar í dag ikki kenna nakað til. So her er avgjørt ein møguleiki hjá føroysku flutningsvinnuni at vera við, ikki bara í Føroyum men eisini í grannalondunum. Sum luttakari á oljumessi hevur Jóhanna eisini nýtt høvi til at vitja nógvar av hinum básunum, eitt nú tann grønlendska. Eg bleiv rættiliga kløkk, tá eg frætti, at grønlendingar ikki eins og føroyingar hava sett krøv til keikant, tí keikanturin er við til at geva vinnulívinum møguleikar og ein virkan lut í oljuvinnuni og fær harvið eisini møguleika at førleikamenna seg. Stjórin í Faroe Ship sigur seg hava góðar vónir til eina komandi føroyska oljuvinnu, sum fer at geva arbeiði og inntøkur til samfelagið umframt nýggjar førleikar. Mynd -  Jóhanna á Bergi her saman við Anju Jacobsen frá PAM Offshore og Esther Dahl frá Vinnuhúsinum frammanfyri føroyska básin á oljumessuni í Aberdeen. Mynd Jan Müller